Oljuskipaflotin gerst alsamt eldri

Yvir helmingurin av oljuskipaflotanum í heiminum er yvir 15 ár og nærum ein triðingur yvir 19 ára gamal. Umhvørvisverndarfelagsskapir óttast fyri, at gomlu skipini økja um vandan fyri vanlukkum, men skipasmiðjur siga, at dygdin á skipunum er meira tengt at viðlíkahaldi enn aldrinum.

KARTIN L. HANSEN

Tað er ikki bert í Føroyum, at skipaflotin gerst eldri, í okkara føri tó orsakað av, at nógv nýggj skip verða seld av landinum. Eisini oljuskipaflotin eldist alsamt.

55,5% av oljuskipaflotanum í heiminum er bygdur áðrenn 1979. 32,2% av flotanum er bygdur áðrenn 1975, men einans 3,8% áðrenn 1970, vísir eitt yvirlit.

Í hesum yvirliti eru oljuskip skip omanfyri 10.000 Brt., og talan er um skipa sum føra ráolju og oljuframleiðslur kring allan heim.

Í 60'unum vórðu nógv sokallaði VLCC oljuskip (Very Large Crude Carriers) bygd, men einki av hesum skipum vórðu í nýtslu nú. Bert eitt av hesum skipum, sum varð bygt í 1970 og trý, sum vórðu bygd í 1971, vóru framvegis í sigling.

Men meira enn 66% av hesum skipum, sum vórðu bygd í tiðarskeiðnum 1974-76, ið var metár fyri bygging av VLCC skipum, eru framvegis í sigling tann dag í dag. Hesi skip eru umleið 250.000 Brt. og kunnu føra umleiða 2 mió. tunnur av olju.

Gomul skip orsøk til oljuvanlukkur

Umhvørvisverndarfelagsskapir óttast fyri, at tann aldrandi oljuskipaflotin økir um vandan fyri oljuvanlukkum. Umboð fyri skipasmiðjur siga tó, at viðlíkahald hevur størri týdning fyri dygdina á skipinum enn aldurin.

Ein kanning, ið varð gjørd av altjóða oljuskipasambandinum, vísti, at oljuflutningsfeløg í ár hava nýtt oljuskip, sum eru yvir 19 ára gomul.

Eldri oljuskip hava verið orsøk til fleiri oljuvanlukkur, sum eru hendar í seinastuni.

Ein oljuvanlukka hendi í Suðurkinahavinum í januar mánaði í ár, tá eitt oljutangaskip úr Maltesa, ið varð bygt í 1974, fór í tvíningar eftir eina spreinging, og olja lak á sjógv.

Í mars mánaði í ár var ein spreinging umborð á einum 262.821 Brt. stórum tangaskipi í Arabiskahavinum. 20 fólk doyðu av spreingini, men eingin oljudálking stóðst av hesum.

Liberiska tangaskipið, Braer, ið fór á land á Hetlandi í januar mánaði í fjør, var eisini eitt gamalt tangaskip. Tað var bygt í 1975 og var 88.313 Brt. Henda vanlukkan fekk bretsku stjórnina at herða á, at trygdarviðurskiftini vórðu hildin umborð á tangaskipum og at tey vórðu herd.

Sambært altjóða reglum skulu tangaskip, ið eru yvir fimm ár, til eftirlit til tess at kanna, hvussu góðum ella ringum standi tey eru í.

Oljuskipaflotin gerst alsamt eldri, og fleiri av gomlu skipunum eru orsøk til oljuvanlukkur. M.a. liberiska tangaskipið, Braer, sum rendi á land í Hetlandi í januar mánaði í fjør. Hetta skipið varð bygt í 1975

Mynd: Shetland Times

MYNDAFÓLK OG TÍÐINDAFÓLK Á VITJAN. Í døgunum 29. august og fimm vikur fram vera 16 myndafólk og tíðindafólk frá Norðurlendska Fólkaháskúlanum á Biskops-Arnö uttanfyri Stockholm á vitjan í Føroyum. Ferðin er partur av einum skeiði í reportagumyndatøku og reportagujournalistikki. Tey lesandi fara á túrinum at savna tilfar, gera samrøður, taka myndir o.a. Longu nú er greitt, at tey fara at hava framsýning í Norðurlandahúsinum. Á myndini eru aftast vinstrumegin: Sofie Nordstrøm, Mattias Ek, Lars-Olof Eriksson, Nina Ström, Michael Tjelder, Lars Åberg (lærari í journalistikki), Anders Blomdal, Cecilia Mellberg, Ewa Levau, Helena Berglund, Åsa Strandberg og Elias Larsson. Hukandi vinstrumegin: Stefan F Lindberg, fotolærari, Jeanette Frank, Maria Antonsson og Stina Roseen.

Eftirlitið við kvotunum er ov vánaligt

Partrolararnir hava fiskað 69% meiri av teirra toskakvotu enn teimum var fallið í lut í tíðarskeiðnum 1. mars til 1. august. Partrolararnir fingu broytt teirra kvotu til eina felagsskvotu. Hetta gjørdi tað torførari at hava eftirlit við, hvussu nógv var fiskað, og hetta verður neyvan gjørt aftur.

KARTIN L. HANSEN

Eftirlitið av umsetiligu kvotunum er ikki nóg gott, og neyðugt er at fáa tað betri. Partrolararnir fiskaðu 69% meira av toski í kvotatíðarskeiðnum 1. mars til 1. august í ár enn teimum varð loyvt.

Tá lógin um vinnuligan fiskiskap varð samtykt í vár, fingu partrolararnir álagt hvør sínar kvotur, men teir søktu um at fáa hetta broytt til eina felagskvotu. Hetta var teimum játtað, men samstundis gjørdi tað eftirlitið við kvotunum munandi torførari. Tað tekur munandi longri tíð at finna út av, hvussu nógv av felagskvotuni er uppfiskað enn kvotan hjá einum einstakum skipi.

Ringar royndir við felagsskvotu

Sambært nýggju kvotalógunum hava partrolararnir fingið egnar kvotur, og roknað verður ikki við, at tað verður játtað teimum at fáa hetta broytt til felagskvotu. Royndirnar við hesum hava ikki verið góðar.

Tann 2. mai í ár varð greitt, at toskakvotan hjá partrolarunum var uppfiskað, og at meirfiskingin fór at verða mótroknað í krónum m.a. yvir iløgustuðulin.

Í summar byrjaðu partrolarar at keypa kvotur frá línubátum, sum ikki høvdu uppfiskað teirra kvotur. Ein partur av teimum 69%, sum partrolararnir hava fiskað ov nógv, eru tær kvotur, teir hava keypt frá línubátum.

Partrolararnir eru eisini farnir út um hýsukvotuna. Teir hava fiskað 40% meira, enn kvotan loyvdi teimum. Haraftarímóti hava partrolararnir bert fiskað 71% av upsakvotuni og 55% av kongafiskakvotuni.

Eisini útróðrarbátar yvir og undir 20 tons hava fiskað meira enn teir høvdu kvotu til. Útróðrarbátar yvir 20 tons hava fiskað 8% út um kvotuna, meðan útróðrarbátar undir 20 tons hava fiskað 46% út um kvotuna.

Línuskipini hava ikki uppfiskað teirra kvotur. Tey hava bert fiskað 73% av toskakvotuni og 56% av hýsukvotuni.

Sambært nýggju kvotalógini eru tað bert útróðrarbátar yvir og undir 20 tons sum hava felagskvotu. Línuskipini hava egnar kvotur.

Trupulleikar við eftirlitinum

Tað hava verið ymiskir trupulleikar at fingið eftirlitið við kvotalógini at virka. Sum skipanin er nú, so áleggur lógin teimum, ið fáa kvotuna, sjálvar at fylgja við, hvussu nógv er fiskað við at føra kvotadagbók. Vektarseðil verður eisini sendur til Fiskiveiðueftirlitið, og avreiðingarseðil frá virkjunum verður sendur til Lønjavningargrunnin.

Fyri at fáa eftirlitið at virka betur, hevur fiskivinnuumsitingin í Tinganesi mælt til at umskipa Fiskiveiðueftirlitið, so meira stýring fæst á kvotadagbókunum. Haraftrat eru felagskvotur eisini torførar at hava við at gera.

– Tað er torført at hava eftirlit, tá allir bátar fiska av somu kvotu. Tað gongur long tíð, áðrenn funnið verður útav, at bátarnir hava fiskað út um kvotuni, sigur Kaj Mortensen, á fiskivinnustovuni í Tinganesi, sum heldur tað er betri, at øll skipini sjálvi hava kvotur, ið er munandi lættari at hava eftirlit við.

Hann vónar, at eftirlitið gerst betur enn tað hevur verið, nú nýggjar kvotur vórðu samtyktar á tingi herfyri.

– Tað týdningarmesta við kvotum er, at eftirlit er við, hvussu nógv verður fiskað, so tað er at vóna, at tað gerst betur framvyir, sigur Kaj Mortensen.

Avtala er fingin í lag við Vaktar og Bjargingartænastuna um at 6 mans skulu hava eftirlit við veiðuni, tá hon kemur á land. Haraftrat ger Vaktar og Bjargingartænastan kanningar av kvotadagbókum á fiskileiðunum.

Bíða heldur

om AIDS, kondomer og ægteskab – 1. del

12.417 personer fra 130 lande har i dagene 7-11/8 været samlet i Yokohama til den 10. Internationale Konference om AIDS. Kristelig Dagblad skriver bl.a.: »Konferencedeltagerne har kun hørt om meget beskedne fremskridt fra de forskere, der forsøger at få bugt med HIV-viruset, som fører til udviklingen af den dødelige sygdom AIDS. Samtidig har deltagerne lyttet til vidnesbyrd om en eksplosiv vækst i sygdommen i udviklingslandene, primært i Asien.«

HIV/AIDS

Er man først smittet med HIV-virus, er man smittet for resten af livet. »Når dette virus kommer ind i et menneskes krop, ødelægger det kroppens naturlige forsvarsmekanismer over for andre infektioner. Viruset angriber specifikt een gruppe celler, som deltager i dette forsvar. Når virus kommer ind i cellen, formerer det sig, gør cellen inaktiv og ødelægger den tilsidst. Når tilstrækkeligt mange af disse celler er ødelagt, kan det angrebne menneske ikke yde modstand overfor andre infektioner, og på det tidspunkt kan man sige, at personen har »Acquired Immunodefiency Syndrome« eller på dansk: Erhvervet immundefekt syndrom, AIDS.«

Ud fra den viden forskerne har i dag, forventes det, at alle der er smittet med HIV-virus før eller siden vil udvikle AIDS (indenfor 10 år), men den, der er smittet, kan smitte andre også selvom vedkommende ikke selv har nogle sygdomssymptomer.

Hvad enten en sygdom er dødelig eller ej, gælder det, at det er bedre at forebygge end at helbrede, og når det gælder AIDS, må vi konstatere, at vi ikke i dag har mulighed for at helbrede. Der er altså mere end god grund til at spørge: Hvordan smittes man? Svaret er ifølge Sundhedsstyrelsen: Den mest almindelige smittevej er samleje.

Hvilket råd vil vi da give som beskyttelse imod HIV/AIDS?

Ser vi på de kampagner, der har kørt/kører på Færøerne og i udlandet, da er svaret som regel: Brug kondom. I bladet Helse, Juni 1994, står der direkte: »Kondomer er den bedste og eneste beskyttelse mod sexsygdomme.« Det er naturligvis ikke sandt, at kondomer er den eneste beskyttelse imod sexsygdomme (herunder HIV/AIDS), men er det sandt, at kondomer er den bedste beskyttelse? Det indtryk kan man ofte få, når man ser på de officielle kampagner, AIDS-rådet på Færøerne har her i sommer bl.a. sponsoreret nogle af roernes dragter. På disse dragter står der: »Saman vit standa ímóti AIDS-vanda«. Og i »ferie-avisen«, ferie tillægget til Dimmalætting på dansk og engelsk, da står der i en annonce: »AIDS – også dit ansvar/ also your responsibility«. Det er to udmærket mottoer, men svaret ind i denne sammenhæng er i begge tilfælde: Et hjerte med en pil igennem hvorpå der hænger et kondom. Det er ikke uden grund, at man får det indtryk, at kondomet sikrer imod HIV/AIDS. Men er kondomet sikkert?

Er kondomet sikkert?

Lægen Caroline Collier skriver i sin bog: »AIDS. Det 20. århundredes pest«: *»At stole på kondomer som en beskyttelse mod AIDS, er som at spille russisk roulette.* Kondomer mindsker sandsynligheden for at blive smittet, men en person, der fortsætter en risikabel livsstil igennem længere tid, er trods anvendelse af kondom i stor fare for at blive smittet.« Hendes begrundelse for at skrive så stærkt er bl.a.: »En nylig undersøgelse viste, at af en gruppe kvinder, hvis mænd anvendte kondomer som eneste svangerskabsforebyggende middel, blev mellem 13 og 15 procent gravide indenfor eet år. Denne fejlprocent er ikke acceptabel, når det gælder svangerskabsforebyggelse, overhovedet ikke, når det gælder beskyttelse mod en dødbringende smittefarlig sygdom. Og en kvinde kan kun blive gravid få dage i løbet af sin menstruationscyklus, medens HIV-smitten kan overføres når som helst.«

Dette understreges yderligere af C. M. Roland, der er redaktør af bladet »Rubber Chemistry & Technology« og er specialist, når det gælder gummiprodukter. Han skriver ang. kondomer og AIDS: »Hvis hensigten er at reducere spredningen af denne sygdom (AIDS) er rådet (ang. kondomer) et dårligt råd.

Kondomets høje fejlprocent i forebyggelsen af graviditet er alene et argument imod brugen af kondomer som beskyttelse imod at pådrage sig en dødbringende sygdom.

Da AIDS-virus er 450 gange mindre end en sædcelle, er et kondoms effektivitet som beskyttelse imod AIDS rent faktisk meget dårligere end når det gælder svangerskabsforebyggelse.

Det er velkendt, at latex gummi indeholder iboende sprækker, som er mindst 50 gange større end AIDS-virus. »Iboende« betyder at sprækkerne forekommer naturligt. Deres eksistens er uafhængig af forløbet vedrørende forarbejdning, fremstilling og håndtering af materialet. Disse sprækker findes i kondomer, handsker, ja alt latex gummi.

Som redaktør af »The American Chemical Society's Journal«, der beskæftiger sig med videnskaben om og teknologien vedrørende gummi, og som forsker på dette område, finder jeg den forestilling absurd, at kondomer tillader en sikkert at engagere sig seksuelt med en HIV-smittet. *Deres kampagne med dette formål for øje er farlig og uansvarlig.«*

Disse to personers konklusion er altså, at kondom kampagnerne mod AIDS er dels farlige og uansvarlige og dels fører mennesker derhen, hvor de spiller russisk roulette med deres liv. Dersom det ikke er usandt fra ende til anden, hvad de skriver, hvad jeg ikke har nogen grund til at tro, da er der virkelig grund til at standse op og spørge: Hvorfor er det kondomer man anbefaler som værn imod HIV/AIDS? Hvorfor?

Peter O. K. Olofson,
Sognepræst, Fuglefjord.